## Ungir tilflytarar

Ein stórur partur av arabisku tilflytararunum í Danmark eru í dag sera ungir. Av palestinum eru nærum helvtin, 45%, undir 15 ár. Samanbera vit við uppruna-danarnar eru einans eitt sindur minni enn 20 % av teimum 15 ár ella yngri.

Talið av ungum eftirkomarum í øðrum ættarliði fer sostatt at vaksa komandi árini. Hetta setur eitt ávíst trýst á danska samfelagið, útbúgvingarskipanini er eitt dømi. Sum sagt, er hetta ein av orsøkunum til varandi kjakið um hvønn leiklut Islam skal hava í danska samfelagnum.



# ur og politikkur



*Ein familja við tveimum smáum ger seg til reiðar til familjumynd í Ummayya-moskuni í Damaskus Mynd: Johan Jacobsen*

sum ikki kenna seg heilt integreraðan í samfelagnum. Tey, sum ynskja at verða í miðstættini. Roy metir hesi ynskja eitt samfelagskjak har muslimar kunnu luttaka við respekt og virðing.

Ífylgi høvundanum og avísskribentinum, Ian Buruma, er mótstøða eitt lyklaorð, tá ið ein hugsar um tað, ið hevur formað hansara tankagóðs ella politisku hugsan. Ramadan er abbasonur egyptiska Hassan al-Banna, ið m.a. stríddist ímóti bretska hjálandaveldinum og stovnaði Muslimska brøðraringin. Diktatur og kolonialisma er fyri honum eitt kent fyribrigdi. Hann hevur eisini sum ungur ferðast nógv í londum sum India, í heimspørtum sum Latínamerika og Afrika. Her hitti hann fólk, t.d. sokallaðir frælsisteologar í Brasil, hvørs frælsisstríð bygdi á trúarmeginreglur, fortelur Ramadan.

Men navnið Tariq Ramadan ella hansara tankar skulu ikki ókritiskt setast ájavnt við heitið Evroislam, sum í roynd og veru er nógv breiðari enn so. Ein radikal útlegging av Evroislam, sum eggjar til altjóða yvirgang, er sjálvsagt eisini kend millum evropearar á ein blóðugan hátt.

rættin at virka fyri trúgv míni, geri eg mótstøðu og stríðist ímóti hesum samfelagnum.«

Ramadan hvettir ikki við traditionalistiska islamska hugsan. Í eini av bókum sínum greiðir hann soleiðis frá: »Málið er at verja muslimska samleikan og átrúnaðarliga praksis, men samstundis at góðtaka vestliga konstitutionella bygnaðin, virkin luttaka sum borgari á sosialum støði og liva í sannum loyaliteti fyri tí landi, ein hoyrir til.« T.d. fanst hann hvassliga at forboðnum ímóti at ganga við sløri í fronskum statsskúlum.

Men sambært franska islamkennaranum Olivier Roy eru fundamentalistar als ikki millum mongu fjeppararnar hjá Ramadan. Og teir fátæku muslimarnir í fronsku forstøðunum kenna hann neyvan. Hinvegin er tað universitetslesandi eftirkomarar úr øðrum ættarliði av tilflytarum, sum hann vendir sær til. Hesi,


<u>Keldur:</u>
Ian Buruma - Euroislam: Fup eller fakta?: Brobygger eller hykler (Information, 10.03.2007) Oliver Roy - Euroislam: Den indre jihad (Á http://www.forlagetvandkunsten.dk/87061)
Trine Korvig - Arabere i Danmark - et statistisk overblik (Á http://dedi.org.eg)